## Knudsen sagt OL farvæl

Tann sterki danski strikuspælarin Michael V. Knudsen skal undir skurð, hann hevur bruna í blindtarminum, hann gevst tí at leika í OL-kappingini. Hann er innlagdur á sjúkrahús í Kina, har hann skal undir skurð í nátt. Annars roknaði Michael Knudsen við at verða klárur til dystin móti Egyptalandi, men hann gjørdist rættuliga ringur beint áðrenn og endaði á sjúkrahúsi. Landsliðsvenjarin Ulrik Wilbek er sera harmur, um at Knudsen gjørdist sjúkur. "Tað er verri at missa Knudsen, enn at leika javnt 23-23 móti egyptum", segði Wilbek eftir dystin. Michael Knudsen gjørdist sjúkur beint eftir setanina av OL. Hann hevði nógva pínu, men læknarnir vistu ikki hvat bagdi. Beint áðrenn dystin móti egyptum, gjørdist hann rættuliga illa fyri, hann fekk tá eisini nógvan febur og var tí koyrdur á sjúkrahús i Beijing, har hann verður lagdur undir skurð í nátt.

## Peter Gade víðari í OL

Danski badmintonleikarin, Peter Gade, spældi seg lættliga víðari til triðja umfarð í Beijing. Hetta skrivar heimasíðan hjá DR í morgun. Mótstøðumaðurin hjá dananum, Nabil Lasmari, kom tíðliga framum við 2-1 í fyrsta setti, og teir fylgdust so upp til 4-4. Harfrá var mestsum bara ein leikari á vøllinum, og Peter Gade vann settið 21-6. Næsta settið vann hann 21-4, og var minst líka sannførandi, sum í fyrra setti. Peter Gade hevur sostatt lættliga spælt seg víðari til triðju rundu við Olympisku leikirnar í Beijing.

NSÍ-KÍ: 2-4 (0-0):

# Sum dagur og nátt hjá klaksvíkingum

*NSÍ*

*KÍ*

**Á útivølli ímóti meistaraliðnum eydnaðist tað við góðum hugburði at vinna tað aftur, sum ikki fekst burturúr á heimavølli mikukvøldið**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*



*Uttan mun til vánaliga sunnudagsveðrið, so var tað hjá KÍ talan um avrik sum ljósasti dagur sammett við myrkastu nátt mikukvøldið*

Tað kendist sum stórur létti, og tí var tað einki at siga til, at tað var mest sum ovfarakæti í KÍ leguni, tá ið Ransin Djurhuus í gjár hevði brikslað fyri síðstu ferð við Løkin.

Heimamenninir vóru ógvuliga vónbrotnir yvir teirra avrik, og tað var ikki frítt, at teir eisini høvdu hug at argast inn á dómaran, sum teir við sínum avgerðum í avgerandi løtum mettu at hava verið óhepnan.

KÍ vann 4-2, og eftir fjórða KÍ málið, sum var skorað í síðstu løtu, vóru NSÍ spælararnir ikki blíðir við dómaran, sum í tí førinum ivaleyst hevði allan rættin á sínari síðu: Rógvi Jacobsen gjørdi skjótt av í frísparksstøðu. Bólturin tók í NSÍ spælara og støkk síðani til Joe Zewe, sum gjørdist púra blankur, tá ið NSÍ spælararnir góvust at renna. Teir høvdu sæð flaggið hjá linjudómaranum á lofti, men dómarin vísti, at hann ikki ætlaði at bríksla, tí bólturin var komin frá mótstøðuspælara og til KÍ mannin. Og so setti Joe Zewe, sum hesa ferð var fremsti sentrali miðvallarin og bæði spældi og stríddist væl meiri, enn hann higartil hevur gjørt, bóltin framvið Tórði Thomsen og í málið. Tað fyrsta síðani hann kom til Klaksvíkar.

Kanska høvdu NSÍ spælararnir meiri grein í sínum máli, tá ið Karoly Potemkin stutt undan steðginum fór um koll í KÍ brotsteiginum, eftir at Jan Andreasen og hann høvdu togast. Tá var støðan málleysur javnleikur, men Ransin metti ikki, at talan var um brotsspark.

### Øðrvísi uppstilling

Mikukvøldið var KÍ í 4-4-2 uppstilling í kiksaða heimadystinum ímóti B68. Tað hevði NSÍ eygleiðarin, sum var í Klaksvík skrásett, og ætlanin tóktist vera at steðga klaksvíkingum frammarlaga, at finna holini á ótøttu KÍ miðjuni og harvið at seta seta KÍ liðið undir trýst.

Men Eyðun Klakstein hevði tikið við læru av mikukvøldinum og broytt rættuliga nógv upp á liðið. Fyri at fáa breidd í, vóru Harley Bertholdsen og Heðin á Lakjuni á vongverjunum, og á miðvøllinum vóru tríggir: Kristoffur Jacobsen og Emil Nolsøe Leifsson og so Joe Zewe frammanfyri teir báðar. Kristoffur og Emil ofraðu seg fullkomuliga, og uppgávan gjørdist ikki torførari í 2. hálvleiki, tá ið Milan Pejcic, sum hevði verið tann besti at binda heimaliðið saman, varð tikin av vøllinum.

Einki mál varð skorað í 1. hálvleiki. At seks mál vórðu skorað eftir steðgin er staðfesting av, at tá var tað rættuliga undirhaldandi. Merkisvert er eisini, at fleiri av málunum vórðu skorað eftir villur í verjuni – í báðum endum.

Bjarni Jørgensen, sum leingi hevur verið skaddur, setti hol á fyri KÍ. Hann var fyrstur á eftir miseydnaða temjing hjá landsliðsspælaranum Jóhan Troest Davidsen. Bjarni sneiddi framvið landsliðsmanninum, áðrenn hann smekkaði bóltin í kassan.

Líta løtu seinni javnaði Bogi Løkin, og aftur var talan um verjumistak. Øssur Dalbúð og Aco Pandurovic, sum annars var í vinstru, spældi væl saman í høgru. Harley Bertholdsen royndi við høvdinum at fáa bóltin burtur eftir innleggið, men hann legði bóltin fyri føturnar á Boga Løkin, sum takkaði fyri.

Rógvi Jacobsen varð skrásettur fyri næsta KÍ málið. Kanska var tað landsliðsspælarin, sum í púra leysari støðu stutt úr málinum stýrdi frísparksinnlegginum hjá Heðini á Lakjuni í málið.

Hetta var miðskeiðis í 2. hálvleiki. NSÍ svaraði skjótt aftur, og aftur varð mál skorað við stórari hjálp frá mótstøðuliðnum ella rættari av mótstøðuliðnum. Eftir NSÍ innlegg úr høgru var miðverjan ikki heilt trygg, og tað endaði við, at Jan Andreasen við høvdinum stýrdi bóltin framvið sínum egna málverja og í málið.

So var 2-2, og eina løtu tóktist tað sum um, at NSÍ tevjaði møguleikan fyri fullari úrtøku. Tað eydnaðist ikki. Í staðin fyri varð tað KÍ, sum streyk avstað við øllum stigunum.

3-2 málið var ivaleyst tað besta. Eftir NSÍ álop, skundaði KÍ sær. Rógvi Jacobsen og Joe Zewe vóru við í uppspælinum, og Rodrigo, sum hesa ferð var ytstur á miðvøllinum í vinstru, var tryggur, tá ið hann gjørdist leysur innanfyri verjuna og setti bóltin framvið Tórði Thomsen.

So var tað, at KÍ í síðstu løtu staðfesti kærkomna sigurin, og at NSÍ spælararnir tóktust ikki sørt ørkymlaðir. Teir høvdu ikki havt marginalirnar á sínaru síðu, og teir høvdu roynt at spæla fótbólt. Mótstøðuliðið hevði eisini roynt at spæla og stríðast, og tað tóktist sum um, at tað var KÍ breiddin – eisini á beinkinum – sum saman við broddi, tyngd og dýpd var orsøkin til, at øll stigini fóru norður til Klaksvíkar.

Uttan mun til vánaliga sunnudagsveðrið, so var tað hjá KÍ talan um avrik sum ljósasti dagur sammett við myrkastu nátt mikukvøldið!

## FM-vinnararnir tapa ofta

Fýra tær seinastu ferðirnarhevurmeistaraliðið úr Runavík mist nógv stig í oddastríðnum. Einu ferðina hava teir vunnið – í 15. umfari á HB -, meðan teir tríggja ferðir hava tapt. Tann 4. juli taptu teir 1-3 á heimavølli móti Víkingi, í farnu viku 0-2 við Margáir móti EB/Streymi og í gjár við tveimum málum móti fýra á heimavølli móti KÍ. NSÍ er nú 11 stig frá oddaliðnum úr Sundalagnum. Komandi vikuskiftið verður kommunuppgerið undir Mýruhjalla, tá runavíkingar vitja inni á Skála.

## KÍ betri ímóti teimum bestu

Eyðun Klakstein var væl nøgdir við sínar spælarar og sítt lið, sum hevði vunnið ímóti NSÍ í Runavík.

- Avrikið hesa ferð var sum dagur aftur ímóti nátt, tá ið hugsað verður aftur á mikukvøldið og tapið á heimavølli ímóti B68. Vit arbeiddu væl saman, og hugburðurin var eina standandi góður, staðfesti KÍ venjarin, sum vísti á, at tað er ímóti oddaliðunum, at KÍ hevur vunnið flestu stigini, og at tað hevur gingið sera striltið ímóti teimum longri niðri á støðutalvuni.

Av teimum 20 stigunum eru seks vunnin ímóti B36, fýra ímóti NSÍ og trý ímóti HB, meðan KÍ hevur bara vunnið eitt stig ímóti Víkingi, B68, ÍF og Skála og trý ímóti B71.